


*Avgerðin at strika ætlanina at byggja íbúðir til sinnisveik í Havn og flyta verkætlanina til Sandavágs, er ósaklig og skeiv og vit taka ikki undir við henni, sigur Hans Pauli Strøm, talsmaður Javnaðarfloksins í almannamálum*

# Valdsmisnýtsla at flyta sinnisveik til Sandavágs

**SINNISVEIK Ætlanin at strika íbúðarbygging til sinnisveik í Havn og at flyta verkætlanina til Sandavágs, er deyðadømd, tí Javnaðarflokkurin í samgonguni ger nú púra greitt, at hann fer ikki at atkvøða fyri tí**

Áki Bertholdsen

- Hetta er ein gøla og avdúkar eina politiska, fyrisitingarliga og fakliga valdsmisnýtslu.

Hans Pauli Strøm er framsøgumaður hjá Javnaðarflokkinum í almannamálum og hann ger nú púra greitt, at flokkurin tekur ikki undir við ætlanini at strika ætlanin at byggja eitt sambýli til sinnisveik í Havn og at flyta alla verkætlanina til Sandavágs.

Hann ger eisini púra greitt, Javnaðarflokkurin fer ikki at atkvøða fyri eini slíkari ætlan og sostatt er hon deyðadømd longu í føðingini.

Hann leggur afturat, at fyri Javnaðaflokkin hevur tað framvegis fremstu raðfesting at byggja íbúðir til tey sinnisveiku, sum hava búð á psykiatriska deplinum ein mansaldur, so at tey fáa mannsømilig kor.

Hann sigur, at umstøðurnar hjá teimum eru so vánaligar, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur átalað tær.

### Óvirðiligt

Hann heldur, at hetta er sera óvirðilig framferð ímóti teimum sinnisveiku at flyta byggingina til Sandavágs.

Og hann heldur harafturat, at hetta er í mótstríð við áhugamálini hjá teimum, sum hetta snýr seg um.

Hann heldur enntá, at málið er so mikið álvarsligt at ábyrgdin av hesum viðurskiftum hjá sinnisveikum skuldi beinanvegin verðið tikin frá Almannamálaráðnum og Nærverkinum og verið flutt til Heilsumálaráðið.

- So kundi Psykiatriski Depilin fingið ábyrgdina av øllum viðurskiftum hjá sálarsjúkum og sinnisveikum og tað ivist eg heldur ikki í, at tey, og teirra avvarandi, høvdu følt seg tryggari við, sigur framsøgumaðurin hjá Javnaðarflokkinum.

### Valdsmisnýtsla

Hann viðgongur, at valdsmisnýtsla er eitt sterkt orð at brúka.

- Men hvat annað skulu vit kalla tað, tá ið politiska valdið í hesum føri roynir at gjøgnumtvinga eina avgerð, sum bæði saknar sakligt grundarlag, gongur beinleiðis ímóti fakliga serkunnleikanum á økinum, og er í mótstríð við áhugamálini hjá teimum, sum málið snýr seg um.

Hann staðfestir somuleiðis, at samgongan er hvørki eftirspurd ella kunnað um ætlanina at flyta verkætlanina til Sandavágs.

Og hann staðfestir, at Javnaðarflokkurin fer ikki at lata sær lynda, at landsstýriskvinnan setir fakliga og politisku viðgerðina til viks fyri at gjøgnumtrumfa eitt persónligt solo-projekt í heimbygdini Sandavági.

- Ætlanin at flyta byggingina til Sandavágs er ósaklig og hon er skeiv.

- Hetta er somuleiðis ein ætlan, hon ikki hevur spurt nakran um. Hon hevur ikki spurt fakliga serkunnleikan á økinum. Og hon hevur ikki nevnt málið við einum orði fyri Løgtinginum, tiansheldur sínum samgongufeløgum, staðfestir framsøgumaður Javnaðarfloksins.

Nú verklagslógin um at byggja íbúðir í Havn, fer úr gildi á nýggjárinum, heldur Hans Pauli Strøm, at fyri at gera málið einfalt, ber til at leggja somu lóg fyri Løgtingið, men at longja hana eini tvey, ella trý ár, so at málið kann avgreiðast.

Aðrastaðni í blaðnum hevur Hans Pauli Strøm grein, har hann eisini viðgerð málið.

## Hvat annað kann mann kalla tað enn valdsmisnýtsla

## Hetta er í mótstríð við áhugamálini hjá teimum, tað snýr seg um

# Rósa 11 dagar eftir

Sinnisbati ger nú eina seinastu roynd at fáa landsstýriskvinnuna í almannamálum at broyta meining.

Rósa Samuelsen hevur gjørt av at strika ætlanina at byggja íbúðir til sinnsveik í Havn og at flyta verkætlanina til Sandavágs, hóast allur serkunnleiki á økinum hevur mælt frá.

Løgtingslógin um at byggja íbúðirnar í Havn, fer úr gildi á nýggjárinum og Sinnisbati vísir á, at sostatt hevur Rósa Samuelsen 11 dagar eftir at broyta meining í.

- Tað er átaluvert, og líkist ongum, at politiski mynduleikin, og fyrisitingin við Rósu Samuelsen landstyriskvinnu í almannaráðum á odda, ikki hava megnað at fingið nakað sum helst burtur úr lógini um at byggja sambýli til sálarsjúk í Havn, sigur Sinnisbati.

- Tilsamans hava 16 milliónir krónur verið tøkar til verkætlanina síðani 2008. Tey hava havt næstan trý ár um at føra hesa verkætlan út í lívið, men kortini hava tey ikki megnað tað enn, staðfestir Sinnisbati.

Og felagið leggur afturat:

Súltar Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannaráðum, hetta mál longri, verður taparin tíverri enn einaferð tey sálarsjúku og teirra rættindini.

Tí heitir Sinnisbati á Rósa landsstýriskvinnuna um at fáa rættlag á hesi viðurskiftir beinanvegin, áðrenn lógin um at byggja sambýli í Tórshavn til sinnisveik fyri kr. 16 milliónir krónur, fer úr gildi á nýggjárinum.

- Hetta er seinasta freistin hjá landstýriskvinnuni í almannaráðum at hjálpa teimum sálarsjúku, sigur Sinnisbati.

# Nógv mótmæli

Í Fleiri ár hevur ætlanin verið at byggja íbúðir í Havn, so at sinnisveik, ið búgva á Psykiatriska deplinum, kunnu fáa eina íbúð.

Fyri tveimum árum síðani legði Hans Pauli Strøm, sum tá var landsstýrismaður á økinum, uppskot fyri Løgtingið um verklagslóg um bygginginga.

Lógin fer úr gildi nú á nýggjárinum uttan at gongd er komin á arbeiðið.

Og herfyri kundi Sosialurin avdúka, at Rósa Samuelsen, landsstýrisikvinna í almannamálum, ætlar ikki at endurnýggja lógina. Ístaðin ætlar hon at leggja uppskot fyri Løgtingið um at flyta alla verkætlanina til Sandavágs.

Hetta er ein ætlan, sum nógvir fakbólkar hava funnist hvassliga at, bæði Sinnisbati og Javni og harafturat hevur Meginfelag teirra Brekaðu eisini verið ivingarsamt.

Samstundis hevur hægsti læknafakligi serkunnleikin á økinum, Tórmóður Stórá, leiðandi yvirlækni á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, gjørt greitt, at læknafakliga tilmælið er so avgjørt at halda fast um ætlanina at byggja í Havn.

Og sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, verður ætlanin nú eisini torpederað politiskt, tí Javnaðarflokkurin, sum er í samgongu, ger púra greitt, at hann fer ikki at atkvøða fyri henni.